# Norðurlandahúsið fær betri pláss

**Fermetratalið í Norðurlandshúsinum verður økt við einum fjórðingi, tá útbyggingin verður liðug í apríl. Í gjár var reisigildi fyri nýggja tilbygninginum**



*Frá reisigildinum hjá Norðurlandahúsinum seinnapartin í gjár*

**ÚTBYGGING**

*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Tvey fundarrúm og eitt ráðstevnurúm til 60 fólk í erva og eitt stórt ráðstevnu-, sjónleikar- og framsýningarrúm í neðra, er ítøkiliga úrslitið av útbyggingini av Norðurlandahúsinum. Tilsamans fær húsið slakar 700 fermetrar at búleikast í afturat, og hetta svarar til, at gólvvíddin verður økt við á leið 25 prosentum.

Í gjár var reisigildi í nýggja tilbygninginum, sum verður knýttur til verandi hús við tveimum gongdum.

Stjórin í Norðurlandahúsinum gleðir seg til at taka nýggja bygningin í brúk.

- Nú hava vit frálíkar møguleikar at víðka virksemið, sum til dømis at gera meiri fyri børn og ung og at økja um ráðstevnuvirksemið, sigur Niels Halm, stjóri.

Hann vísir á, at longu síðsta ár vóru umboð fyri danska ráðstevnu-fyrireikarar í Føroyum og hugdu eftir umstøðunum, og hesi vóru sera væl nøgd við tað, tey sóu.

- Vit hava gjørt ráðstevnubransjuna vart við, at tað er líka so lætt at koma til Føroya at halda ráðstevnu, sum at fara til Aalborg. Og her fáa luttakararnir bæði eina náttúru- og atmosferu-uppliving, sum tey ikki fáa aðrastaðni, sigur Niels Halm.

Útbyggingin, sum bæði Mentamálaráðið og Tórshavnar kommuna hava stuðlað, verður liðug í apríl. Í sambandi við at nýggi tilbygningurin verður tikin í nýtslu, og at tað í ár eru 25 ár liðin, síðani Norðurlandahúsið varð bygt, fer húsið at skipa fyri stórum jubileumstiltaki fríggjadagin 9. apríl.



*Niels Halm, stjóri í Norðurlandahúsinum, og Jákup Simonsen, mentanarleiðari í Tórshavnar kommunu, avmyndaðir í sambandi við reisigildið í gjár*



*Norðurlandahúsið fær slakar 700 fermetrar afturat at búleikast í, tá nýggi tilbygningurin verður tikin í nýtslu í apríl*


Starvslýsing

Heimatænastan

## Endurlýsing eftir Deildarleiðarum til Heimatænastuna í Suðurstreymoy - øki 1

Heimatænastan í Suðurstreymoy søkir eftir deildarleiðarum.

Heimatænastan í Tórshavn er býtt í 3 økir, Vestur-, Eystur- og Miðøkið. Í hvørjum øki er ein tvørfakligur bólkur av starvsfólki við heilsuhjálparum, heilsurøktarum og sjúkrarøktarfrøðingum. Til hesar tvørfakligu bólkarnar sóknast vit eftir 3 deildarleiðarum.

Deildarleiðarin hevur dagligu leiðsluna av einum tvørfakligum bólki og samstarvar í toymi saman við hinum deildarleiðarunum og deildarleiðaranum fyri sambýlini.

Deildarleiðararnir eru undir leiðslu av økisleiðaranum. Uppgávan verður, saman við starvsfólkunum og leiðslutoyminum at skipa eina samansjóðaða tænastu, har vit við umsorgan stuðla undir virkisførleika og vælveru hjá tí einstaka borgaranum.

**Vit vænta av tær, at tú**
- Hevur útbúgving innan heilsurøkt
- Hevur hug og hegni at leiða og fyrisita
- Evnar at samstarva við bæði brúkara, avvarðandi, starvsfólk og leiðslu
- Hevur telduførleika á brúkarastøði
- Royndir og útbúgving í fyrisiting og leiðslu er ein fyrimunur

**Sum deildarleiðari hevur tú ábyrgdina av**
- Dagligu leiðsluni og fakligu ábyrgdini av veittum tænastum.
- At leiða, stuðla og menna starvsfólki
- At virka verður innan givnar fíggjarkarmar

**Vit kunnu bjóða**
- Eitt dynamiskt og fjølbroytt starv
- Eitt jaligt og vinarligt arbeiðsumhvørvi
- Eitt starv við nógvum avbjóðingum
- Fakliga og persónliga menning

**Setanartreytir**
Lønar og setanartreytir eru sambært sáttmála við Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Um tú ynskir at vita meira um starvið kann tú venda tær til Ceciliu Vestureið, økisleiðara, ceciliav@naerverk.fo , tlf. 31 72 49 ella 21 72 49

**Umsókn**
Umsóknin skal sendast og stílast til:

Nærverkið
Meginskrivstovan
Argjavegur 26
100-Tórshavn
Stílað: Gunnleyg Durhuus, leiðari
Viðmerkt: umsókn

**Umsóknarfreist 29. februar 2008.**

**Les meira á www.naerverk.fo/leys størv**

Nærverkið kemur út til borgaran at veita tænastur, ið fevna um eitt nú stuðul, tilboð til borgarar við serligum tørvi og tænastur til barnafamiljur og eldri. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almanna- og heilsumálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Barnatænastan. Nærverkið leggur áherðslu á nærleika, umsorgan og professionalismu í øllum lutum. Umleið 1400 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn · Tel 36 00 00 · Faks 36 00 01 · meginskrivstovan@naerverk.fo

www.naerverk.fo